## Mentamálaráðið

# Deildarstjóri til vinnu- og miðnámsskúladeildina

**Starvið:**
Nú deildarstjóri okkara fer úr starvi er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini í Mentamálaráðnum.

Mentamálaráðið er skipað við 3 deildum: Fólkaskúladeild, vinnu- og miðnámsskúladeild og mentamáladeild.

Høvuðsuppgávurnar hjá vinnu- og miðnámsskúladeildini eru at:
- Fyrisita hægru umsitingina av vinnu- og miðnámsútbúgvingum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar á økinum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum
- Standa fyri dygdarmenning og KT í skúlaverkinum

Deildarstjórin er leiðari á vinnu- og miðnáms-skúladeildini, og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum og stovnum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava
- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt menn-andi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir, serliga nú starvsøkið stendur fyri stórum avbjóðingum
- Áhuga fyri avbjóðingum

**Vit bjóða:**
Mentamálaráðið mennist alsamt og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandasamstarv.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggamálaráðið og viðkomandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. mai 2003. Starvið verður sett frá 1. august 2003 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 35 50 50.

***Mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Í* ***vinnu- og miðnámsskúladeildini*** *eru Studentaskúlar, HF-skeið, Handilsskúlarnir, Teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlin, Sjómansskúlarnir, Maskinmeistaraskúlin og lærlingaútbúgvingar. Deildin stílar fyri KT og dygdarmenning í undirvísingarverkinum.*

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

### Lærarar til kommunalu skúlarnar í Tórshavnar kommunu

Skúlastýrini í Tórshavnar kommunu søkja eftir lærarum til kommunalu skúlarnar skúlaárið 2003/2004.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2003/2004, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

**Til Kaldbaks skúla**
1 lærara at undirvísa umleið 10 tímar um vikuna

**Til Kollafjarðar skúla**
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar, sum hava lækkað tímatal og avlopstímar

**Til Argja skúla**
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna

**Til Venjingarskúlan**
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna
1 lærara at undirvísa 26,5 fyri lærarar, sum hava lækkað tímatal

**Til Kommunuskúlan**
5 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar í farloyvi og lækkað tímatal

**Til Sankta Frans skúla**
3 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar í farloyvi
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar, sum hava lækkað tímatal
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 3. septembur og 28 vikur fram

**Til Eysturskúlan**
5 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar í farloyvi
2 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar, sum hava lækkað tímatal
1 lærara at undirvísa umleið 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá skúlaárs byrjan og 24 vikur fram
1 lærara at undirvísa í 26,5 tímar um vikuna vegna avlopstímar

**Til Hoyvíkar skúla**
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi
4 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar, sum hava lækkað tímatal, serligan tørv og avlopstímar
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna frá 1. september fyri lærara í barnsburðarfarloyvi
1 lærara at undirvísa umleið 20 tímar um vikuna

**Meiri fæst at vita**
um størvini frá skúlastjórunum ella Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 315160.

**Umsóknir**
til størvini skulu verða Mentamáladeildini hjá Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. mai 2003. Við umsóknini eiga at verða løgd avrit av prógvbrøvum og møguligum viðmælum.

SNARSKIVAN

---


**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

**Stilladsútgerð og forskallingsútgerð**

**Er ætlan at keypa ella leiga:**
- Forskalling og tilhoyr
- Forskallingsolja & sproytur, klams, konus, avstandsrør, stoypibats, fuguband, armeringsjarn v.m.
- Facadustillads
- Trygdargirðing
- Aluminium rullustillads
- Arbeiðsplatformar

HÜNNEBECK



Sosialurin 311820



**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**

Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820



## Urtagarðsarbeiði

Umframt røkt av urtagørðum gera vit eisini grasvallir, tún, bríkar úr hagagróti og annars alt innan nýgerð av urtagørðum.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53




# S Ø L U F Ó L K

Søkt verður eftir einum sølufólki til Sandavágs Timburhandil at byrja beinanvegin.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um:
Sølu og innkeyp, eins og viðkomandi kemur at hava høvuðsábyrgdina av søluni av køkum.

Vit vænta at tú megnar at abeiða sjálvstøðugt og ert støðugur. Hevur hegni at tekna og hevur sølutekki

Løn eftir avtalu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 20. mai 2003.

Send umsóknina til

**Sandavágs Timburhandil**
**á Hillingatanga 6**
**Fo 360 Sandavágur**
**tel 332700 fax 332701**
**e-mail kovin@post.olivant.fo**

**SANDAVÁGS TIMBURHANDIL**

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin í Øksnagerði**

Í dagstovninum ganga 58 barnagarðsbørn

Stovnurin er skipaður við einari smábarnastovu og tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari serstovu við10 børnum. Á stovninum starvast 19 starvsfólk.

Vit eru ein nýggjur stovnur, ið lat upp í september 2001. Stovurnar eru góðar og rúmligar. Vit hava útbúgvið fólk á øllum stovum.

www.torshavn.fo

### Pedagogar og hjálparfólk til Dagstovnin í Øksnagerði

Tórshavnar kommuna søkir eftir tveimum pedagogum og einum hjálparfólki til Dagstovnin í Øksnagerði at byrja juli/august 2003.

**Størvini**
- 1 pedagogstarv, 40 tímar um vikuna í barnagarðsstovu, at byrja 1. juli 2003
- 1 pedagogstarv, 35 tímar um vikuna í barnagarðsstovu, at byrja 15. august 2003
- 1 hjálparfólk, 40 tímar um vikuna í barnargarðsstovu at byrja 4. august 2003

**Vit ynskja**
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- at tú hevur hugsjónir og torir at siga tína hugsan
- at tú luttekur í menningini av pedagogiska umhvørvinum
- at tú dugir at samskifta bæði við børn, foreldur, starvsfólk og onnur

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett í juli/august. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jesper Roos Nielsen, leiðara ella Gunrid Hansen, varaleiðara, tlf. 319959 ella tlf. 219959.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerði 1, FO-100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 12. juni 2003.

---



# Skeiðsdepilin

### Útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilskúla og á Tekniska Skúla

Skeiðsdepilin, sum nú hevur 15 ár á baki, er í dag størsti skeiðsútbjóðari í Føroyum.
Vit veita útbúgving á tí tekniska økinum eins væl sum á tí handilsliga. Vit hava Tekniska skúla og Føroya Handilsskúla í Havn. Á Føroya Handilsskúla á Kambsdali kunnu vit hava skeið fyri Eysturoynna og Norðuroyggjar. Eftir tørvi hava vit eisini skeið í Suðuroynni og í Vágum.

**Skeiðini eru víðfevnandi:**
- Leiðaraútbúgving og leiðsluamboð
- Persónlig menning eins væl og starvsfólkamenning
- Søla, tænasta og útflutningur
- At arbeiða við teldu og forritum
- Búskapar- og roknskaparlæra
- Mál
- Serstøk skeið innan almennu fyrisitingina
- Serstøk skeið innan heilsuverkið
- Skeið fyri meistarar, handverkarar og teknikkarar

**Vit eru ávegis, ein nýggj leið liggur fyri framman, tí leggja vit nágreiniliga dent á:**
- innanhýsis skeið í tøttum samstarvi við kundan
- ráðgeving um framtíðar- og miðvísar førleikar

Ring og hoyr nærri.
Georg Suðurgarð, gs@hsh.fo ella
Doris Tróndarson,dt@hsh.fo, Tel 318813

Vit vitja fegin tykkara stovn ella fyritøku og tosa um tykkara útbúgvingartørv.

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn, Tel 318813, Fax 313374

team 85 • 35800

---

## Happadráttargrunnurin

Gjørt verður kunnugt, at nú kann søkjast um stuðul úr Happadráttargrunninum.

Endamál grunsins er at veita stuðul til nýskapandi og nýhugsandi tiltøk til frama fyri brekað. Tær umsóknir, ið eru sendar Happadráttargrunninum í 2002 og 2003 verða viðgjørdar saman við nýggju umsóknunum. Tær umsóknir, ið eru sendar Happadráttargrunninum í 2001 verða ikki viðgjørdar og verða tí at senda av nýggjum saman við oyðibladi, ið kann fáast við at venda sær til Almannamálaráðið, tlf. 30 40 50. Umsóknir verða at senda til:

**Happadráttargrunnurin**
**Almannamálaráðið**
**Eirargarði 2**
**100 Tórshavn**

Umsóknir skulu vera ráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. mai 2003.

**Ráðið fyri Happadráttargrunnin**